# í Miðlahúsinum







Per Højgaard, miðlaráðgevi hjá EIK banka og Uni Leitistein Hansen, samskipari hjá Substanz, ið hava arbeitt við at fáa filmsverkætlanina »Føroyska søgur« av bakkastokki

Mynd: Jan Müller

## Fakta

Brot úr filminum »Føroyskar Søgur« verða sýnd fyrstu ferð í Miðlahúsinum sunnudagin 27. juli klokkan 15 og annars restina av ólavsøkudøgunum.

»Føroyskar Søgur« kemur út sum DVD 19. september

tær kunnu vera til gagn fyri søgufrøðingar, tíðindafólk og ikki at gloyma komandi ættarlið av føroyingum.

Hetta umfatandi arbeiði at varðveita mentanina hevur einans verið gjørligt orsakað av áhuganum og fíggjarliga stuðlinum frá Eik Grunninum.

– Eik er ikki bara til fyri at vinna pening. Eitt av endamálum hjá Eik er eisini at vera samfelagnum at gagni, staðfestir Per Højgaard, samskiftisráðgevi hjá Eik Banka, tá hann verður spurdur, hví Eik hevur valt at stuðla »Føroyskar Søgur«.

– Øll fáa gagn av »Føroyskum Søgum«, tí samlaði føroyski mentanararvurin á filmi verður í sambandi við hesa verkætlan latin upp fyri øllum, og tað fer uttan iva at hava kolosalan týdning fyri søgufatanina hjá komandi ættarliðum av føroyingum, sigur Per Højgaard.

## Gloppa dyr

Per Højgaard viðgongur eisini, at hann er sera hugtikin av úrslitinum, ið er komið burtur úr verkætlanini.

– Nú havi eg sæð rættiliga fitt av tilfarinum, ið verður at finna á »Føroyskar Søgur«, og eg má viðganga, at tað, ið eg havi sæð, hevur bergtikið meg. Tað er heilt fantastiskt at síggja livandi myndir úr Føroyum heilt frá 1907, tá Fríðrikur kongur áttandi kemur á vitjan, til dagin í dag. Onkursvegna, so gloppa »Føroyskar Søgur« einar dyr inn í nýggjari føroyska søgu, ið higartil hava verið afturlatnar, heldur Per Højgaard.

Tað ber illa til at siga annað, enn at Miðlahúsið í Vágsbotni, er ein hóskandi pallur at geva fólki ein forsmakk upp á »Føroyskar Søgur«. Miðlahúsið húsast í gomlu handilshølunum hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni, ið eru søgulig í orðsins sanna týdningi. Á trappuni í Miðlahúsinum stendur eisini ein gomul leyva úr træi, ið stavar frá karrusellini hjá Christian Martini Rubeksen, ið koyrdi so lystiliga hvønn sunnudag klokkan 16 á Ingutrøð við Lucas Debesar gøtu í 1920unum og 30unum. Karrusellin hjá Christian Martini verður eisini vakt til lívs á »Føroyskum Søgum«.